# Megnarverk við lýtum






**UMMÆLI**
*Kinna Poulsen*

Bókin er ovurhonds stórfingin og prýðilig og í vavi størsta listabók, ið enn er útkomin á føroyskum. Og hóast tørvurin á Mikines-bókmentum ikki tykist beinleiðis bráfeingis á bókahillini í mun til mong onnur av teimum føroysku listafólkunum, sum lítið og einki eru viðgjørd, eru vit sjálvandi púra samd við løgmanni Jóannesi Eidesgaard, sum í eini viðurkenning fremst í bókini vegna Føroya fólk takkar íslendska forlagnum, Nesútgáfan, ið tók stig til glæsiligu útgávuna.

## Vøkur bók

Bókin er innbundin, svørt, monumental og serstakliga vøkur í stórum kvadratiskum formati. Valið av fremstu kápumyndini, sum er ein av teimum friðsælu og ljósu myndunum av Mykinesbygd frá 1950, er heldur óvæntað og gevur ábendingar um, at bókin kanska ikki er júst soleiðis, sum ímyndað. Myndaúrvalið er stórt og rættiliga breitt og umboðar ikki einans tær góðu myndirnar, men eisini minni góðar myndir sum t.d. tær heldur naivu, stirvnu myndirnar, hann málaði í tjúgunum. Umframt hesum útivið 248 væleydnaðu endurprentunum í litum av verkum Mikines´, eru eisini einar 50 svarthvítar fotomyndir av málaranum og hansara lívi at síggja í bókini, ið sum heild tykist rættiliga ævisøguliga hugað.

## Tveir smærri tekstir

Umframt myndirnar inniheldur bókin tveir smærri, men áhugaverdar tekstir, sum ávikavíst Bent Irve og Bárður Jákupsson hava skrivað. Tann fyrri snýr seg um Mikines og Danmark og hóast ávirkanin sum danska kunstakademiið og danska listaumhvørvið hevði á Mikines ikki skal undirmetast, tykist tað sum um, at Irve ger nakað nógv av, tá hann umvegis Ríkisfelagsskapin Danmark og Føroya millum metir Mikines vera bæði danskan og føroyskan málara. Fortreytirnar vóru nú einaferð sum tær vóru, tá Mikines fór at útbúgva seg í 1928, men lítið er at ivast í, at Mikines sum tann evnaríki og kensluborni listamaðurin, hann var, hevði fingið væl burtur úr eini listarligari útbúgving, eisini uttan fyri Danmark. Teksturin hjá Bárði er eitt gott og nýtiligt ævisøguligt yvirlit yvir lív listamansins.

## Høvuðsteksturin

Høvuðstekstin eftir Aðalsteinn Ingólfsson, havi eg glett meg at lesa, síðani tað av fyrstan tíð hoyrdist graml um Mikinesbókina og at ein íslendskur listfrøðingur skuldi skriva hana. Samstarv við og kunnleiki til aðrar tekstir hjá Aðalsteinn hava stuðlað upp undir góðu vónirnar til hesar tveyhundrað síðurnar um Mikines, sum er nógv tann gjølligasta viðgerðin av málaranum higartil. Men longu formælið gevur eina ófrættakenda kenslu av vónbroti, sum tíverri stendur við gjøgnum meginpartin av tekstinum, ið sum heild er nógv meira ævisøguligur enn væntað.

## Konstruerað sjálvsævisøga

Formælið byrjar skaldsliga in medias res, mitt í eini tilburðargongd: "Skoraður upp ímóti skottinum í tronga stýrhúsinum á postbátinum kundi Sámal so dánt hóma systrina á dekkinum...". Umrøddi tilburðurin er, tá Mikines við familju fylgir deyða pápanum til heimbygdina. Uppliving Mikines´ av hesum tilburði hevur hann sjálvur lýst sum eina týdningarmikla listarliga uppliving og soleiðis skilt er hetta kanska ikki býttasta stað at byrja frágreiðingina um listamannin Mikines. Men eitt er at vera ævisøguliga hugaður og eitt annað er at konstruera eina sjálvsævisøgu, har lesarin er staddur í tonkum málarans umvegis eitt alvitandi frásøgufólk: "Sámal kundi ikki fáa skil á øllum teimum tonkum, ið bylgdust í honum. Eyðvitað saknaði hann faðir..... Fór deyði faðirsins nú at gera tað, at hesi herðindi fóru at koma aftur? Hetta var uppi í ræðsluni, ið fekk magan at knýta seg saman". Seinastu viðmerkingarnar sipa til psoriasis-sjúkuna, sum Mikines var so ringur av. Tað skulu ivaleyst vera fleiri, ið halda dramatiska skriviháttin vera góðan og spennandi og tað heldur yvirritaði eisini, tá hann kemur fyri í eini skaldsøgu, men í listasøguligum høpi býður hann ímóti. Fyri tað fyrsta tykist tað óálítandi, tá ein rithøvundur í eini listabók greiðir frá tonkum listamansins á henda hátt. Hann kann ómøguliga vita júst hvussu Samuel Elias Joensen-Mikines kendi og hugsaði, tá hann fylgdi pápa sínum. Í øðrum lagi hevur skrivihátturin ein óviljaðan komiskan dám, ið kemst av samanrenningini av hátíðarligum drama og patos og so undirskilta og intima tónalagnum og støðuga brúkinum av fornavnsháttinum Sámal.

## Mikines-bókmentirnar

Sum áður nevnt eru Mikines-bókmentirnar lutfalsliga umfatandi í føroyskum listbókmentum

*Framhald á næstu síðu*